## TILTØK

**Gudstænastur**
**1. sunnud. í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11 Bjarni Bæk
*Kaldbak:* kl. 12 Sverri Steinhólm
*Vesturkirkjan:* kl. 11 Bergur D. Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11 Heri Joensen. Familjugudst. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldif yri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, kirkjan fyllir 10 ár. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna, Martin R. Jacobsen.
*Fríðrikskirkjan:* kl. 12 Familjugudstænasta
*Gøta:* kl. 15: Familjugudstænasta. Talvan gongur fyri barnaheim í Kiev og fyri frítíðararbeiðið í kirkjukjallaranum í Gøtu
*Glyvrar:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð. Í Glyvra prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sjóvar kirkja:* kl. 12. Kl. 17 Ljósmessa, Jógvan Fríðriksson. Í Sjóvar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Skála:* kl. 11, altarg., Jóannis Fonsdal
*Fuglafjørður:* kl. 12, Tito Esguerra, biskupur og Uni Næs. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa
*Norðskála:* kl. 15, ljósgudst. kl. 20 vesper (aftansangur fyri enskari fyrimynd við Kóri Glyvra kirkju), Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna
***Hvalvíkar kirkja 175 ár***
Kl. 11 gudst., Hans J. Joensen, biskupur, tjørnuvíkingar syngja Kingo. *Kl. 18* gudstænasta við altarg., Bjarni Bæk, dómpróstur prædikar og Sundakórið syngur
*Kollafjarðar kirkja:* kl. 15, Adventshugni, sum heldur fram í Missiónshúsinum
*Christianskirkjan:* kl. 11, klokkarainnseting og 25 ár síðan Niels Pauli Danielsen varð innsettur sum sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Pól Johannessen
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Sonja Klein. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Viðareiði:* kl. 17, lestur. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Svínoy:* Elsa Funding
*Eldrasambýlið í Vági:* kl. 15 gudstænasta, Patrick de Neergaard
*Tvøroyri:* kl. 11, Familju- og barnagudstænasta, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Porkeris kirkja:* Sunnudagin gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Dalur:* kl. 12, Jákup R. Hansen

**Fríkirkjan Oasan uppi á Brekku 3**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Martin Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting, barnaansing verður eisini
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, kl. 12 tilbiðjanarmøti har Jógvan Zachariassen talar um »Týdningurin av einum – partur 2«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Drekkamunnur er millum møtini. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Øll eru vælkomin. www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 hámessa v/ Michael Bienkowski prestur í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til kl. 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Innsavnanin av bússunum til børnini í Kiew er útsett til 9. januar.
Kl. 18 Møti v/ Hera Joensen, Jónhilda og Gullak Hansen syngja.
Mánadagin kl. 20 Kvinnumøti.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 verður Familjutími har hornmusikkurin skipar fyri. Drekkamuður.
Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni, kl. 18 Møti í Missiónshúsinum v/ Elsu Jacobsen, kristniboðara.

**Frá Ebenezer**
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, talari: Poul Johan Djurhuus.
Mánadag kl. 17 Kvinnur koma saman til bøn í Sloans húsi. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Junior, kl. 14 Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 18, 100 ára føðingar-dagshald fyri Heimamissiónina, luttøka v/ Sólbjørg Símunarson og Hera Tróndheim o.fl. Innsavnað verður til Heimamissiónina.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 19.30 í KFUK: Adventsveitsla. Inngangur við Bergi Debes Joensen presti. Kristiliga sangkórið luttekur. Søga frá Hera Tróndheim.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sonju Klein presti. Evnið: Forfylging av kristnum í okkara tíð.
Týsdagin kl. 17 Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 verður eisini møti. Símun Absalonsen talar um evnið: Náði Guds.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, frásøgn við myndum frá seinasta Rumenia túrinum.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-10. flokk.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Malenu Meitilberg, evnið er: Gestablídni 2. partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ David Bech og kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ David Bech. Øll eru vælkomin.

**Nazaret, Kaldbak**
Á bønar- og uppbyggingarmøtinum 7. des. greiða Símun Ósá og Óli Steinberg frá arbeiðinum í Grønlandi, har teir virka sum trúboðarar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Sunnudagin kl. 15 Adventshugni í kirkjuni, drekka í missiónshúsinum aftaná.
Týsdagin kl. 20 Bíbiltími, apostlasøgan kap. 11.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 hevur sunnudagsskúlin adventshugna, vit gera jóladekoratiónir og fáa kaffi við rísalamande o.ø.

**Meinigheitshúsið í Sandavági**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 verður kirkjufólkið í Sandavági boðið til evniskvøld, John S. Myllhamar viðgerð kirkjunnar trúðarorð. Aftaná er kaffiborð, har høvi verður at tosa um evnið.

**Missiónshúsiðí Hvalvík**
Vegna hátíðarhald hjá kirkjuni verður eingin sunnudagsskúli og einki møti sunnudagin.

**Avhaldshúsið í Haldarsvík**
Vikuskiftismøtir verða fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Hesi luttaka við sangi, talu og vitnisburði. Magnus P. Johannesen, Thomas J. Askham, Olvheðin Jacobsen, Regin Drangberg, Gulak og Jónhilda Hansen, Hedvig og Hallmar Winther, Trioin í Klaksvík syngur.
Sunnukvøldið er innsavnan til børn í Rumeniu. Øll eru vælkomin til møtini.

**Saron, Vestmanna**
Evangel. møti verður Sunnudagin kl. 18, Jón Miðberg talar.
Mánadagin 29. verður ungdómsmøti kl. 20. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Norðskála**
Jólahugnin hjá sunnudagsskúlanum við Norðskála verður í kirkjuni sunnudagin 5. desember kl. 15.00. Øll eru vælkomin.,

**Samkoman Lívsins Orð**
Sunnudagin er møti kl. 10.30.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 við sangi og vitniløtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Missiónsvikan heldur fram í dag kl. 10. Bíbiltími við Asger Jensen, Bornholm. Borðreitt verður við kaffi og rundstykkjum, kl. 16 Barnamøti, kl. 20 Møti, Asger Jensen talar og Meinigheitskórið í Havn syngur.
Sunnudagin kl. 15 Barna- og foreldramøti í kirkjuni við barnaráðgevanum Marjon Poulsen, Barnakórið syngur, kl. 19 Møti, Niels J. Nielsen trb. talar, Skála Streingjakór syngur. Innsamling til húsið.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21: Awake við Jóhan Petur Jóhannesen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við vitnisburði og sangi.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Trev Gregery úr Onglandi talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Marius Jacobsen úr Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kom til hugnaløtu**
leygarkvøldið 27. kl. 20 í lokalunum hjá arbm. Hæddini í Runavík. Vil tú koma har øll skilja teg, so kom á andaliga hugnaløtu hjá ex-misnýtarum. Tey skilja teg, óansæð um tú ert ella hevur verið misnýtari av alkoholi v.m. Eisini um tú ert ein av teimum avvarðandi. Ella um tú bara ætlar tær at hugna tær í andaligum umhvørvi, har øll eru líka. Bara av náði. Sangur, vitnisburður kaffi v.m. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman mánakvøldið kl. 19.30 til hugnaløtu í húsinum hjá kvinnufelagnum á Glyvrum – mint verður á jólapakkarnar. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Siloa, Fuglafirði**
Sunnukvøldið kl. 18 Familjumøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Eingin sunnudagskúli verður sunnudagin, men adventshugni verður kl. 18, har barnakórið kemur at syngja. Marjon Poulsen, barnaráðgevi, luttekur.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Una Næs, presti. Ungdómsmøti kl. 21.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Getsemane, Klaksvík**
Vikuskiftismøti vera í Skálanum 26.-28. nov., við Kaj Tønnesen og Jørn Strand úr Noregi.
Leygardagin kl. 16 Familjumøti, kl. 21.30 Ungdómscafé.
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti. Drekkamuður er aftaná møtini. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti v/ Tórleif Johannessen, sjómanstrúboðara, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betesda, Norðoyggjar**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.30 Sunnudagsskúli,
kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadag kl. 20 Bønarfundur.
Mikudag kl. 20 Uppbyggingarfundur.
Hósdag kl. 21 Ungdómsfundur.

**Viðareiði**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman til jólahugna, í missiónshúsinum mánakvøldið 29. kl. 19.30. Havið ein lítlan jólapakka við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómscafé, Essa, Molly og Krist-Bjørg vitna og syngja.
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Innsavnan til barna- og ungdómsarbeiði.

**Sands Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Oda Hentze innleiðir, Sølvi hugleiðir um heimamissiónina. Sangur við Sølva, Egin og Terja. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vegna familju- og barnagudstænasta verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin.
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Ebbu og Nimrod.
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnudagin verður Familjusunnudagsskúli í Missiónshúsinum í Hvalba kl. 15.00. Drekkamuður verður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin. Onki møti verður.

**Bethel, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Evangel. fundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Talarar úr oynni og sangkórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir.

**Frelsunarherurin í Vági**
Leygardagin kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti. Major Njál Djurhuus talar á hesum møtunum.

**Ørkin, Reykjavík**
Leygarkvøldið 4. des. kl. 20.30 Hugnakvøld v/ Leo Hans og Sigrun Mikkelsen. Sagt verður frá og vístar myndir frá Afrikutúri.
Sunnudagin 5. des. kl. 14 verður jólatræ fyri børnum, kl. 20.30 Møti v/ Leo Hans og Sigrun. Aftaná verður kaffi. Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi.

**Hirtshals**
Føroyskt møti verður í Hirtshals missiónshúsi (Vestergade 13) sunnukvøldið tann 28. nov. kl. 18 v/ Hera Elttør trúboðara. Eftir møti verður kaffi o.a. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 1. januar 2005 kl. 15.00 giftast í Evangeliihúsinum í Tórshavn, Annika Jørgensen, Sørvágur og Magni Reinert, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Miðvági kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til teirra stóra dag, verða biðin um at tekna seg á tlf. 212480, 216185 ella 220145 áðrenn 5. desember.

Leygardagin 4. desember kl. 10.00 giftast í býráðssalinum í Havn Randi Fjallsá, Tórshavn og Andras Nolsøe, Trongisvágur. Brúdleypsveitslan verður í Pálsstovu kl. 13.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## GULLBRÚDLEYP

Tann 4. desember hava hjúnini Hansa og Benjamin (Benni) Joensen í Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 16.00. Øll eru vælkomin.



## TILTØK

Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 29. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
kl. 14-17 Havnaprát, Birgar Fridtleif Johannesen.
**10. des. verður jólaborð í Tilhaldinum. Tilmeld. tlf. 316491.**
*Týsdagin 30. november*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. saman við skúlabørnunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00: Ábyrgd fyri egnari heilsu. Húsmóðir á Eiði. Anna J. Ellingsgaard
*Mikudagin 1. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00-21.00: **Jólasøla og tombola í kjallaranum**
*Hósdagin 2. desember*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát, Brandur Petersen
kl. 15.00–17.00: **Jólasøla og tombola í kjallaranum**
*Fríggjadagin 3. desember*
kl. 10.00–13.00: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 15.00-17.00: **Jólasøla og tombola í kjallaranum**

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 29. november*
Jákup Reinert Hansen heldur fyrilestur um tað at arbeiða við at skriva eina ritgerð. Hetta er í samband við ritgerðina hann hevur skrivað um Jákup Dahl
*Mikudagin 1. desember*
Vit spæla Boccia fyri seinastu ferð áðrenn jól. Vit spæla í Virkinum og byrja sum vanligt kl. 14.00. Reyða liðið spælir móti tí bláa.
***Mikudagin 8. desember*** eru vit boðin til jólahugna í Missiónshúsinum í Skálavík. Vit fara við bussi úr Tilhaldinum kl. 18 og fara úr aftur Skálavík kl. 22.30. Kostnaður 100 kr. fyri hvønn. Neyðugt er at tekna seg til túrin í seinasta lagi mikudagin 1. des. í Tihaldinum ella á tlf. 361990.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 29. november*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Aftaná gera vit jóladekoratiónir
*Týsdagin 30. november:*
Vit spæla Boccia
*Mikudagin 1. desember:*
Dagtilhaldið stongt vegna gudstænastu fyri eldri í Glyvra kirkju kl. 16.00
*Hósdagin 2. desember:*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
*Fríggjadagin 3. desember:*
OPIÐ HÚS. Kaffi, te og pannukøkur.

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarabúðin).

**Al-Anon**
Fundir fyri avvarðandi at alkoholikarum er mánakvøld kl. 21.00 í gomlu lærara íbúðini í Glyvra skúla.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

"Tann, ið bjargar lívi sínum, skal missa tað; og tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal bjarga tí." Mt. 10, 39.

Einaferð ringdi ein maður til mín, hann var eitt sindur forstýraður, og var so keddur av, at Jesus hevði sagt hesi orðini, tí hann helt tað vera so meiningsleyst, um hann datt á sjógv, at hann ikki skuldi royna at bjarga sær uppaftur á turt. Eg kundi bara siga við hann, at var tað soleiðis hann skilti orðini, so kundi eg ikki annað enn geva honum rætt. Men eg mátti eisini fortelja honum, at Jesus enntá breyt sabbatina fyri at bjarga menniskjum úr neyð, og hann forsvaraði tey, sum brutu bæði lógina og sabbatina, fyri at bjarga menniskjalívi.

Nakað seinni ringdi hesin sami maðurin aftur til mín. Eg hoyrdi beinanvegin, at hann spurdi pent, um hann kundi syngja ein sang fyri mær. Jú, jú, tað var í lagi. Eg helt, at hann fór a syngja ein sang, sum hann sjálvur hevði yrkt. Men hann sang Føgur er foldin. Hann hevði ikki vakra rødd, fyri at siga sum er var ikki tóni skaptur í høvdinum á honum, men hann sang so hjartaliga, at tað var rørandi. Tað, sum var serliga rørandi var tann týdning, hann legði í henda sálmin, at, sum hann segði, foldin er føgur, tí okkum nýtist ikki at bjarga okkara lívi.

Eg fortaldi, at maðurin var eitt sindur forstýraður. Tað var hann, hann var sinnisveikur. Men eg havi ongantíð hoyrt eina so stutta, beinrakna prætiku, og eina so neyva tulking av hesum jólasálma: »Okkum nýtist ikki at bjarga okkara lívi – tí er foldin føgur.«

Storm P. fortelur í eini skemtitekning um ein klovn, sum ferðaðist frá cirkus til cirkus. Ein dagin møtti hann einum fínum ráðharra, ella var tað sjálvur statsministarin. Hesin fíni harrin, sum á kropsmálinum avdúkaði, at hann helt seg vera fínari enn onnur, spurdi cirkusklovin: »Sið mær, er tað ikki eitt láturligt arbeiði at vera klovn«. Og hin svaraði: »Ikki tá man veit, at man er tað.«

Storm P., sum var ein kristin maður, rakar sum ikki einaferð plett. Hvør skal siga: »Vit eru øll klovnar fyri Várharra, men teir størstu klovnarnir eru tey, sum ikki vita, at tey eru tað.«

Tá ið man kennir Storm P. og hansara alsk til gatubørnini, sum ikki duga ella orka at liva eitt lív, har øll eru stoypt í sama formi, so kann eg ikki lata vera við at flenna at øllum teimum sjálvhátíðarligu persónunum í hansara skemtitekningum. Ikki bara tí at teir eru stuttligur, men tí, at tað eisini býr nakað álvarsamt undir. Tað er álvarsamt fyri tann sjálvhátíðarliga at vera sjálvhátíðarligur, tað er øgiliga álvarsamt, tað er so álvarsamt, at um hann ikki er sjálvhátíðarligur, so heldur hann seg missa lívið. Við øðrum orðum, tann sjálvhátíðarligi roynir alt tað hann kann at bjarga lívinum - tað er hetta sum er láturligt - men veruleikin er tann, at at er júst tí, at hann missir lívið. Hann missir tey veruligi virðini í lívinum – og tað er hetta, sum er so álvarssamt, at tað er til at gráta yvir, um man ikki velur at flenna.

Eg veit ikki um tit hoyrdu Johannes Møllehave í sjónvarpinum. Har citeraði hann Kierkegaard, sum segði, at skal man finna ein kristnan, skal man leita eftir einum humoristi. Ein ikki-kristin kann saktans vera humoristiskur, men ein skuldi treyðugt møtt einum kristnum, sum ikki er humorist. Tað er orðarætt tað, sum Kierkegaard sigur í sínum verki Kjerlighedens Gjerninger.

Eg eri samdur við Kierkegaard. Teir skriftlæru høvdu ongan humoristiskan sans, og úrslitið var hareftir, teir hongdu seg í lógirnar, og øll tey, sum ikki passaðu í teirra form, vórðu útstoytt. Og hvat gera vit kristnu? Gera vit ikki akkurát tað sama, tá vit, gravalvorlig, Várharrasa vegna, eru fornermaði inn á fólk, tí tey ikki eru stoypt í sama formi sum trongskygdar áskoðanir loyva? Tá er tað nógv álvarsamari, og menniskjansligari, at flenna eitt sindur eftir sær sjálvum og viðurkenna, at vit eru øll klovnar fyri Várharra, men at tað sum ger lívið vert at liva er tann sannroynd, at hann er har, sum vit eru; At hann ikki sleppur okkum úr hondum, hóast skræðan er skitin, og hjartað dálkað. Tí tað eru ikki vit sum er góð, tað er Jesus sum er góður, frelsan er ikki okkara verk, tað er Jesuspápi, sum frelsir, við at seta allar lógir til viks til frama fyri sínum leitandi og smáu mannabørnum, sum ikki so frægt sum duga at flenna at egnum veikleikum, og sum tí enda í falskleikans álvarsemi.

At enda. Eg helt eisini tað var humoristiskt, tá hasin maðurin ringdi til mín og sang Føgur er foldin í telefonini. Tað var nokkso stuttligt, ein fremmandur maður ringdi, og sang Føgur er foldin. Men tað virkaði væl, so væl, at eg viðhvørt havi hug til at ringja til onkran, sum eg haldi er í so keðiligur, og gera tað sama. Ella til onkran, sum treingir til ein ugga. Men eg geri tað ikki, tí vit eru jú í so álvarsom. Men eg kenni ein, sum kvøður fyri okkum, nú kirkjuárið endar, og tá nýggja kirkjuárið tekur við, kvøður fyri okkum føgur er foldin, tí hann, Jesus Kristus, gjørdi hana so fagra, at vit gott kunnu taka okkum av løttum, tí at alt tað álvarsama, øll skuldarkensla, alt tað, sum vil bjarga okkum sjálvum, er tikið av okkara herðum.

*Ólavur Rasmussen*


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**



**Billettprísur: 85,- kr.**
Leygardagin 27.11. kl. 22⁰⁰
Sunnudagin 28.11. kl. 21¹⁵



Leygardagin 27.11. kl. 19⁴⁵
Leygardagin 27.11. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 28.11. kl. 19⁰⁰
Sunnudagin 28.11. kl. 22⁰⁰



Leygardagin 27.11. kl. 20³⁰
Sunnudagin 28.11. kl. 19³⁰



Leygardagin 27.11. kl. 16³⁰
Sunnudagin 28.11. kl. 16³⁰

**KOMANDI FILMAR**



**Frumsýning Fríggjadagin 03.12. – Billettprísur: 55,- kr.**



**Frumsýning Fríggjadagin 03.12.**